# perliguni



*- Spæliskipanin hjá AaB hóskar væl til mín, tí hon minnir nógv um hana eg havi spælt á landsliðnum við einum hangandi áleypara. Eg eri eisini hampiliga væl nøgdur við míni persónligu avrik higartil. Eg havi hvørki spælt illa ella yvirvæl, men eg haldi hinvegin, at eg havi verið rættiliga støðugur, sigur 24 ára gamli Súni Olsen*

*Mynd: Annfinn Hjelm*

rik higartil. Eg havi hvørki spælt illa ella yvirvæl, men eg haldi hinvegin, at eg havi verið rættiliga støðugur, sigur hann.

### Stórt álit

Venjarin hjá superligafelagnum AaB og føroyska landsliðsleikaranum er svi-in Erik Hamrén. Hóast AaB ikki stendur seg so væl í superliguni, sum mongu áskoðarnir í Aalborg høvdu vónað, situr dámligi sviin trygt í venjarasessinum í Norðurjútlandi.

- Hann er ein fantastiskur venjari, sum hevur bæði beinini á jørðini. Erik tosar nógv við okkum spælarar bæði undir venjing og í dysti, og tað dámar mær væl, tí so veitst tú, hvar tú flýtur. Hann er rættiliga róligur maður, men samstundis er hann ikki bangin fyri at geva ilt av sær, tá tað krevst. Hann gongur eisini ótrúliga høgt upp í, at vit eta rætt, er skoðsmálið frá Súna Olsen.

Herfyri fekk føroyski landsliðsleikarin at vita frá Erik Hamrén og hjálparvenjaranum Allan Kuhn, at teir hava stórt álit á sær.

- Eg tosaði við teir herfyri, og eg varð róstur fyri at hava góðan hugburð til venjing og í dysti. Teir høvdu bitið merki við, at eg ikki fór so lætt niður við høvdinum, tá á stóð. Báðir søgdu seg eisini hava stórt álit á mær, og tað kennist sjálvsagt rættiliga væl at fáa slík skoðsmál, greiðir Súni frá.

### Landsliðið

Seinasta fríggjadag setti Fótbóltsamband Føroya Jógvan Martin Olsen í starv sum nýggjan landsliðsvenjara. Á tíðindafundinum kom undan kavi, at nýggi landsliðsvenjarin hevur í hyggju at seta Súna Olsen á miðvøllin í komandi undankapping.

Gøtumaðurin hevur annars, síðan hann fyrstu ferð fekk landsliðsboð verið fastur fúsur á vinstra bakki, hóast nógvar atfinningarsamar røddir hava verið frammi um at flyta evnaríka gøtumannin á miðvøllin.

- Ja eg fekk eitt smíl, tá eg hoyrdi frá mammu, at hann hevði sagt tað á tíðindafundinum. Eg havi trívist fínt á vinstrabakki, men tað er einki dulsmál, at mín favoritt pláss er á miðvøllinum, har eg eisini kann gera nakað offensivt, so tað verður spennandi at royna seg á miðvøllinum á landsliðnum, greiðir hann frá.

Seinast í januar mánaða verður drigið lut um, hvørji lið skulu hittast í komandi undankapping. Spurdur hvørjum tjóðum, hann vónar at Føroyar møta, svarar Súni Olsen:

- Nú spæli eg saman við tveimum (Rasmus Wurtz og Allan K. Jepsen, blðm), sum plaga at vera úttiknir til danska landsliði, og tí kundi tað verið stuttligt at møtt Danmark. Vit hava ongantíð møtt Italia ella Onglandi, og tað eru tvey lið, sum kundi verið spennandi at spælt ímóti, sigur hann.

### Heimligt

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Súni Olsen roynir seg uttanlands. Frá 1999 til 2002 royndi evnaríki gøtumaðurin seg í hollendska felagnum FC Zwolle. Hóast tað gekk væl á vøllinum, kendi gøtumaðurin seg eitt sindur einsamallan uttanfyri vøllin.

Á tíðindafundinum í summar, tá skifti til AaB varð almannakunngjørt, vísti Súni eisini á, at júst Aalborg og Danmark høvdu týdning fyri hansara spælaraskiftið, tí væntandi vóru umstøðurnar meira heimligar, sum hann tók til.

- Uttanfyri vøllin gongur eisini væl. Daman hjá mær býr her í Aalborg og eg havi eisini nógva familju í Danmark. Millum okkum spælarar er eisini gott samanhald uttanfyri vøllin. Mær dámar væl Aalborg sum bý og fólkini her eru niðri á jørðini, sigur Súni Olsen at enda.

# Súni eitt frískt lot

**-Tað hevur verið eydnan hjá Súna, at AaB slapp sær av fleiri spælarar í summar, tí hópurin í heyst hevur ikki verið nóg breiður. Nú fleiri leikbann og skaðar hava gjørt um seg, hevur Súni dugað væl at tikið av møguleikanum, sigur tíðindamaðurin á Tipsblaðnum og á Onside, Jens Jørgen Brinch**

ÚTISETI
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Aalborg:**
- Súni er ein habilur Superliga-spælari. Hann er fullur av orku og vilja, og hann er avgjørt eitt frískt lot á AaB liðnum. Í Superliguni hava vit leingi saknað leikarar, sum tora at skjóta langt úti frá, og tær dygdirnar hevur Súni so avgjørt.

Føgru orðini eigur Jens Jørgen Brinch, sum er tíðindamaður hjá bæði Tipsblaðnum og Onside á TV3. Síðan 1992 hevur hann búð í Aalborg, og seinastu mongu árini hevur hann gjøllað fylgt gongdini hjá AaB. Royndi tíðindamaðurin letur eins og venjarin hjá AaB væl at avrikunum hjá Súna Olsen higartil.

- Hann hevur ein góðan hugburð og stríðist væl í nærdystunum. Eg haldi, hann kemur best til sín rætt, tá hann spælir á vonginum, heldur Jens Jørgen Brinch.

Tá Súni skrivaði undir við AaB í summar, væntaði Jens Jørgen Brinch ikki, at føroyski landsliðsleikarin fór at vinna sær pláss á Superliga liðnum so tíðliga, sum hann hevur gjørt. Hann var sannførdur um, at Súni fyrstu mánaðirnar varð noyddur at vísa sítt virði á danmarksseriuliðnum hjá AaB.

- Tað hevur verið eydnan hjá Súna, at AaB slapp sær av fleiri spælarar í summar, tí hópurin í heyst hevur ikki verið breiður. Nú fleiri leikbann og skaðar hava gjørt um seg, hevur Súni dugað væl at tikið av møguleikanum, vísir Jens Jørgen Brinch á.

Spurdur um hvørji útlitini eru fyri, at Súni Olsen bítur seg fastan á AaB liðið, svarar Jens Jørgen Brinch:

- Við núverandi hópi skal ikki nógv til, áðrenn Súni verður fastur maður, men velur leiðslan í AaB at styrkja um hópin, verður torførari. Tað hevur verið nógv tosað um, at vetrarsteðgurin skal nýtast til at finna nýggjar spælarar, og tá kann tað gerast torført hjá Súna at fáa fast pláss. Súni er ikki nakar profilur, men fyrst og fremst ein góð gardering á AaB liðnum, sigur Jens Jørgen Brinch at enda.

# Ov veikur kropsliga

**Venjarin hjá AaB, Erik Hamrén, er væl nøgdur við avrikini hjá Súna Olsen higartil. -Tekniskt og taktiskt hevur Súni alt fyri at klára seg í Superliguni, men honum vantar enn nógv í kropsliga partinum av spælinum, heldur hann**

ÚTISETI
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

**Aalborg:**
- Tekniskt og taktiskt hevur Súni alt fyri at klára seg í superliguni. Hann er ein góður fótbólsspælari og samstundis ein klókur fótbóltspælari. Hann er mentalt væl fyri og skjýtur væl bæði við høgra og vinstra beini.

Venjarin í AaB, Erik Hamrén, tykist vera rættiliga væl nøgdur við avrikini hjá Súna Olsen í AaB búnanum higartil. Hann ásannar, at uppruna-liga var ætlanin ikki, at føroyski landsliðsleikarin skuldi fáa so drúgva spælitíð á bestu liðnum longu í heyst.

- Vit væntaðu, at hann skuldi brúka fyrstu mánaðirnar til at venja seg við leikferðina. Sjálvandi hava mongu skaðarnir og leikbann gjørt sítt til, at hann hevur fingið so nógva spælitíð, men misskil meg ikki: Hann hevur gjørt tað gott bæði í dysti og í venjing, sigur sviin.

Spurdur hvørjar eginleikar Súni skal arbeiða við fyri at veruliga standa seg í Superliguni, svarar Erik Hamrén:

- Honum vantar enn nógv í kropsliga partinum av spælinum. Hann er framvegis ikki nóg sterkur í nærdystunum, og hann skal gerast meira eksplosivur bæði við og uttan bólt. Yvirskipað skal hann arbeiða skjótleikanum og kropsligari venjing sum heild, vísir AaB-venjarin á.

Higartil hevur Erik Hamrén nýtt Súna á fleiri ymiskum plássum á vøllinum. Føroyski landsliðsleikarin hevur roynt seg á øllum plássum á miðvøllinum og á báðum bakkunum í AaB-troyggjuni.

*Hvat besta plássið hjá Súna?*

- Ja, hatta er ein góður spurningur. Ein av orsøkunum til, at vit keyptu hann var júst tað, at hann kundi spæla á fleiri plássum. Hansara besta pláss er óivað mitt á miðjuni, men til tað plássið krevst eisini, at tú ert væl fyri kropsliga, svarar Erik Hamrén.

*Hvussu vilt tú lýsa Súna sum persón?*

- Hann er stillur og róligur. Tað tekur tíð at læra hann at kenna. Hóast hann er stillur og róligur uttanfyri vøllin, so er hansara hugburðurin á vøllinum, sum hevur størstan týdning, og har smæðist hann als ikki burtur, svarar hann.